## DAGSINS MEINING

# Eitt gott tiltak

Vælferðarsamfelag er ein norðurlendskt uppfinning, ið hevur gjørt Norðurlond til heimsins bestu og tryggastu lond at liva í, um samanborið verður við onnur heimsins lond. Hetta seinasta er týdningarmikið at minnast til, tí hetta merkir, at tað enn er langt á mál við vælferðarsamfelagnum. Flestu føroyingar munnu vera samdir um, at vit skulu varðveita og støðugt menna vælferðarsamfelagið. Hóast vit eru ósamd um átrúnaðarligar og tjóðskaparligar spurningar, so munnu vit innast inni øll vera samd um, at Føroyar framhaldandi skulu vera eitt norðurlendskt vælferðarsamfelag.

Men eitt vælferðarsamfelag er ikki givið einaferð med alla. Hetta er nakað, ið støðugt má dagførast, útbyggjast og mennast. Tað er tí at fegnast um, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur gjørt av at nú skal ferð setast á arbeiðið við at endurskoða forsorgarlógina. Hetta er eitt gott tiltak. Tað er breið semja um, at galdandi forsorgarlóg er ótíðarhóskandi. Talan er sum kunnugt um danska lóggávu, sum er tillagað føroysk viðurskifti, men annars er talan um lóggávu sum langt síðan er farin úr gildi í Danmark, har onnur og meira tíðarhóskandi lóggáva er komin í staðin.

Hóast vit støðugt menna vælferðarsamfelagið, verða tað altíð menniskju, ið hava tørv á hjálp og á serstøkum tilboðum. Galdandi lóg er alt ov tung at umsita og brúkarin kennir seg mangan sleptan uppá fjall, sum landsstýrismaðurin málber seg í blaðsamrøðu við Dimmalætting hósdagin. Eisini skapar lógin trupulleikar fyri tey, sum skulu umsita lógina, so her eru allar góðar grundir til at fáa til vega nýtt lógarverk fyri økið. Talan er um eitt stórt og tungt øki, og røddir hava verið frammi um at flyta økið út til kommunurnar. Sum tað skilst er hetta ikki ætlanin hjá sitandi landsstýrissamgongu, og tað man vera gott tað sama. Sum nevnt er hetta initiativ landsstýrismansins at fegnast um. Tað verður tó einki nevnt um barnaforsorgarlógina, men vónandi verður hetta mál eisini loyst í hesum umfari. Nógv børn og nógvar barnafamiljur hava tað ikki gott, og tørvur á ábótum eisini á hesum øki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lomborg verður ikki fyrimyndin

**Støðan hjá super borgarliga danska ráðgevanum, Bjørn Lomborg, verður ikki við Javnaðarfloksins vilja fyrimyndin fyri føroyska orku- og umhvørvispolitikkinum. Bjørn Lomborg hevur seinastu tíðina verið løntur av donsku borgarligu stjórnini fyri at siga, at støðan hjá umhvørvinum er góð og at tað ikki er neyðugt at føra ein virknan umhvørvispolitikk.**



**John Johannessen**
*tinglimur fyri Javnaðarflokkin*

"Støðan hjá umhvørvinum er góð og tí er ikki neyðugt at føra ein virknan umhvørvispolitikk." Hetta er høvuðsboðskapurin hjá super borgarliga danska ráðgevanum Bjørn Lomborg, sum landsstýrismaðurin í orkumálum hevur boðið til Føroya at røða um orku og umhvørvi tann 20. august.

Landsstýrismaðurin boðar í tíðindaskrivi frá, at Bjørn Lomborg er boðin til Føroya í sambandi við arbeiðið at orða ein føroyskan orkupolitikk. Vónandi er ætlanin hjá landsstýrismanninum við hesi vitjanini at fáa lív í orku- og umhvørviskjakið. Er ætlanin hjá landsstýrismanninum hinvegin, at hugsjónirnar hjá Bjørn Lomborg skulu vera grundarlagið undir føroyska orkupolitikkinum, fær hann ikki undirtøku fyri hesum frá Javnaðarflokkinum.

**Køvir útyvir**
Lomborg hevur seinastu tíðina verið eitt gott navn hjá borgarligu stjórnini í Danmark at halda seg til. Júst tí, at hann hevði hesar hugsjónir um, at ikki er neyðugt at taka størri umhvørvisatlit, tí umhvørvið hevur tað gott, hevur hann verið tað stóra oraklið hjá danska forsætisráðharranum, tá tað um umhvørvispolitikk ræður. Borgarliga danska stjónin hevur við Lomborg í rygginum skúgvað til viks tann frálíka umhvøríspolitikkin, sum undanfarna Socialdemokratiska stórnin í Danmark setti sær fyri.

**Aftur á rættkjøl**
Vónandi er ætlanin hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, við vitjanini hjá Lomborg ikki tann sama. Er hetta kortini ætlanin, fer Javnaðarflokkurin at seta seg ímóti og fáa orku- og umhvørvispolitikkin hjá samgonguni aftur á rættkjøl.

# B36 í Hálsi

TÍÐINDASKRIV

Leygarkvøldið tann 24. juli kl. 23:30-04:00 verður eitt stórt tiltak í Høllini á Hálsi sum B36 skipar fyri.

Páll Finnur Páll, tann vælkendi tónleikabólkurin sum júst hevur havt eina rimmar framførslu í sambandi við G-festivallin, fer longu á Pallin aftur, hesu ferð í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Afturat teimum verður eisini DJ-show við Dj-Switch og tann altíð í góðum hýri Jákup Jacobsen. Teir báðir eru serstakliga kendir fyri at kunna seta rættiligt lív í eina áskoðarafjøld.

Tiltakið byrjar sum nevnt kl. 23:30 og dyrnar lata aftur kl.04:00. Bussar koyra sum vant. Ring á tlf.:
Eysturoyaleiðin
21 64 64
Vága- og Vestmannaleiðin
21 52 77

# Árbók fyri Føroyar 2004

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroya Skúlabókagrunni*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur í samstarvi við Hagstovu Føroya givið út *Árbók fyri Føroyar 2004,* sum bók við fløgu. Í árbókini er nýggjasta hagtalstilfarið um føroyska samfelagið við enskum undirteksti. Tær mongu frágreiðingarnar og talvurnar geva eina fjølbroytta mynd av samfelagsumstøðunum í Føroyum. Sum nakað nýtt eru fleiri farmyndir við, ið greidliga lýsa ávís viðurskifti. Ein fløga fylgir við bókini, har allar talvur eru at finna sum pdf- og excelfílar.

Árbókin, sum er almenna hagtalsverkið fyri Føroyar, er ein sera hent handbók hjá politikarum, fyrisiting, fakfelagsfólki, stovnum, fyritøkum, fjølmiðlum, feløgum, lesandi og ikki minst skúlum. Fløguútgávan, ið fylgir við árbókini, ger, at tað ber til at arbeiða við tølunum á teldúni.

Her kunnu øll samfelagsáhugað kunna seg um mong ymisk viðurskifti, t.d. íbúgvaviðurskifti, fiskivinnu, landbúnað, ídnað, kommunuviðurskifti, almannamál, kirkjumál, heilsuverk, mentanarvirksemi. Aftast í bókini eru leitorð.

Til skúlabrúks gevur Føroya Skúlabókagrunnur út frálærutilfar til árbókina. Talan er um 13 smærri hefti við ymiskum uppgávum og frágreiðingum til nøkur av høvuðsevnunum, ið eru at finna í ár-bókini. Heftini eru ætlað fólkaskúla, miðnámsútbúgvingum og til framhaldslestur. Tey eru ein góð hjálp til betur at skilja hugtøk og taltilfar. Bøkurnar *Samfelagsfrøði 1* og *2 og Tit bygdu hetta land* venja næmingar at viðgera, meta um og taka støðu í samfelagsspurningum, samstundis sum tær lýsa søguliga baksýnið. Til hesar bøkur er árbókin ein góður stuðul.

Talvurnar í árbókini hevur Hagstova Føroya skipað fyri. Føroya Skúlabókagrunnur stendur fyri útgávuni. Ingi Joensen hevur gjørt permumyndina. Hestprent hevur umbrotið og prentað. *Árbók fyri Føroyar 2004* er 330 blaðsíður og kostar 248 krónur, íroknað fløguútgávuna. Árbókin fæst til keyps í øllum bókabúðum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Ólavsøkuframsýningin 2004

TÍÐINDASKRIV
*frá Listafelag Føroya*

Aftur í ár letur Listasavn Føroya dyrnar upp fyri ólavsøkuframsýningini. Verkini, sum verða sýnd fram í ár, eru 131 í tali, og tað er Listafelag Føroya, sum skipar fyri framsýningini. Nevndin í felagnum hevur staðið fyri úrtøkuni og uppheingini. Meginparturin av teimum 39 luttakarunum á framsýningini eru konufólk.

Framsýningin letur upp ólavssøkuaftan kl. 14 og letur aftur 1. august kl. 18.

Tey flestu verkini eru myndir, málningar, prent og tekningar

Ein røð av fínligum abstraktum myndum gera vart við seg. Tær eru eftir Lottu Andersson úr Svøríki. Jógvan Biskopsstø og Agnar Lamhauge gera - á sera ólíkan hátt - vart við seg við nærløgdum og nett málaðum og teknaðum myndum.

Mong av teimum kendu og dugnaligu listafólkunum sýna fram eitt nú Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni og Torbjørn Olsen, sum hvør við sínum eyðkenda stíli seta náttúrlýsingina í fokus. Ein lýsandi mynd eftir Torbjørn Olsen avmyndar tríggjar ungar kvinnur - sum tær, ið komu til grøvina hjá Jesusi og ein annar stóð fyri teimum? Fleiri onnur lýsa náttúru, fjøll, haga og sjógv, sum framvegis eru týðandi myndevni, hóast tey ikki eru so einaráðandi sum fyrr.

**Ung luttøka**
Tað er ein gleði at síggja, at nógv yngri fólk hava sent áhugaverd verk inn og summi taka lut í ár á fyrsta sinni. Tað eru millum onnur Heiðrik á Heygnum, sum hevur givið kvøldmáltíðini nýtt lív. Høgni T. Hansen lýsir andsøgnina millum tað reglubundna og undantøkini í gerandisdegnum í eini áhugaverdari mynd, har ramman og uppheinging-artøknin er serstøk.

Tóra Joensen er umboðað á framsýningini við tveimum flottum oljukrittekningum. Bárður Oskarsson hevur á hegnisliga teknað nýggjar av sínum løgnu verum, og Jensina Olsen hevur eins og tann unga Emilia Dam avmyndað smákyktlíkar verur og skordýr.

**Lutir úr gerandisdegnum**
Myndirnar hjá Anker Mortensen, Hanna Bjartalíð og øðrum skapa eina heild fyri seg á framsýningini, tí tey hava myndevni frá lutum í gerandisdegnum og úr fjølmiðlum, sum lýsa mannalyndi, rørslur og kenslur. Saman við myndunum hjá Sigrun Gunnarsdóttur Niclasen fortelja myndirnar týðuligar søgur.

Heilt nógv verk hava blandaða tøkni sum stílreinu prentini við tekning hjá Astri Luihn við motivum úr kvæðum.

**Installatiónir**
Standmyndirnar og installatiónirnar eru fleiri í tali. Vígdis Petersen hevur millum annað tríggjar hálvkúlur við glasbrotum í, sum hon kallar "Upphav". Astrid Macdonald hevur gjørt eitt par, ein ungan mann, sum stoltur vísir ein stóran kalva fram fyri eini konu. "Segl og tari" er ein installatiónin, sum er sett saman av tveimum málningum og einum rekatræi við segli á. Tað er Rannvá Holm Mortensen hevur gjørt hana.

**Skemt og álvari, lættir tónar og myrkir**
Skemt eyðkennir fleiri myndir eitt nú tær hjá Sigrun Gunnarsdóttur Niclasen, meðan álvarsemi og bersøgin lýsing av lívsins meira døpru síðum eyðkenna myndirnar hjá m.ø. Øssur Johannessen.

**Mynd fyri einki**
Ólavssøkuframsýning er søluframsýning og kortini er ein mynd á framsýningini ár, sum ongan prís hevur (sum heldur ikki ogn). Hon, sum hevur gjørt myndina sigur, at tann sum er før ella førur fyri at taka myndina og fara við henni, meðan framsýningin er opin, kann hava hana.

**Felagið**
Listafelag Føroya er stovnað í 1941 og hevur skipað fyri ólavssøkuframsýningum síðani 1948. Nevndin í Listafelagnum hevur hesa manning: Pál Weihe er formaður; Helgi Fossádal er kassameistari; Annika Marr Poulsen og Marjun Sigurðsdóttir eru nevndarlimir og Malan Marnersdóttir er skrivari.

Øll kunnu gerast limir í felagnum og limagjaldið er 200 kr. árliga. Høvuðsendamál felagins er at stuðla føroyskari list einamest við at keypa verk og skipa fyri framsýningum. Ársaðalfundur verður 4. september kl. 14 í Listasavninum.

**Ólavsøkuframsýningin er opin:**
Ólavsøkuaftan kl. 14–20
Ólavsøkudag kl. 14–20
30. juli kl. 11–17
31. juli kl. 14–18
1. august kl. 14–18

# Innrás av gomlum bilum í Kirkjubø

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroya Ellisakførum*



*Heini á Borg, formaður í Føroya Ellisakførum og Jóannes Paturson, bóndi, í túninum framman fyri 900 ára gomlu stokkastovuna. Hóskvøldið vitjaðu 15 ellisakfør og um hálthundrað fólk í Stokkastovuni, har borðreitt varð búgvið borð við góðum føroyskum viðskera*

Hóskvøldið var innrás av gomlum bilum í Kirkjubø, tá Føroya Ellisakfør skipaðu fyri útferð til forna staðið, Kirkjubø. Men hóast bilarnir vóru gamlir, so er Stokkastovan meira enn tvífalt so gomul, sum allir teir gomlu bilarnir til samans, sum hetta kvøldið vitjaðu gamla bispasætið

Teir vóru 15 í tali, gomlu bilarnir, sum hóskvøldið vitjaðu Kirkjubø saman við eini hálvthundrað fólkum. Tað var felagið Føroya Ellisakfør, sum skipaði fyri útferð til søguliga staðið hetta kvøldið.

Bilarnir fóru í »skrúðgongu« frá felagshølunum yviri við Strond í Havn til Kirkjubøar - ella í raðkoyring, sum tey plaga at kalla tað.

Í Kirkjubø varð vitjað í Stokkastovuni og í kirkjuni. Jóannes bóndi Patursson greiddi hegnisliga frá um garðin og gamla bispasætið, meðan gestirnir nutu ein breyðbita við føroyskum viðskera í 900 ára gomlu Stokkastovuni, sum kom rekandi í Hestfirði fyri 900 árum síðani, eftir at eitt skip, ið var rikið langt av leið frá Noregs strond, fórst í Skálsíðjubáruni. Stokkastovan er altso ikki bygd av rekaviði, men varð tilevnað í Sogn og Fjordane í Noreg, har hon varð sett upp og síðani tikin niðuraftur fyri at flyta á annað stað.

– Soleiðis kunnu vit siga, at Stokkastovan er fyrsta »typuhús« í Føroyum, helt Jóannes bóndi skemtandi.

Um vit siga, at tey fimtan ellisakførini, sum vitjaðu Kirkjubø hetta kvøldið, í miðal vóru 30 ára gomul, so er Stokkastovan kortini tvíflalt so gomul. Og har búgva framvegis fólk! Húskið hjá Jóannes bónda er 17. ættarliðið á garðinum - og at búgva í einum 900 ára gomlum húsi er sera sjáldsamt - kanska er tað eindømi í søguni, at fólk framvegis búgva í so gomlum timburhúsum?

# Ólavsøkan 2004 á Norðurbryggjuni 28. og 29. juli



Føroyahúsið og feløgini skipa fyri ólavsøkutiltøkum úti á Bryggjuni, Strandgade 100.

– Á ólavsøku er maður mans gaman. Her hittast ung og gomul fró og fegin, onkur í tjóðarbúna, annar í T-skjúrtu og kubbabrókum á tjóðarhátíð okkara. Sama ger. Hittast og práta, skemta og spáka, fáa ein koss, geva ein koss….. og síggja Bryggjuna, kappróðurin, lýða á tónleik, sang, leggja uppí ella bara hyggja, síggja og verða sædd…

Øll eru hjartaliga væl komin á ólavsøku !

**Ólavsøkuaftan:**
Kl. 15.00: Ólavsøkuframsýningin í stovuni er opin
Kl. 15.30: Skrúðsigling við føroyskum bátum úr kanalini inn í hylin við Bryggjuna. Kórsangur
Kl. 16.00: Tryggvi Johansen setir ólavsøkuna
Kl. 16.30: Kappróðurin byrjar: Asiatisk Plads til Bryggjuna
*Samtíðis kunna vit fylgja við kappróðrinum í Havn*
Grønlenskar kajakkir vísa kynstur síni í hylinum
Kl. 18.00: Heiðursmerki verða handað
Kl. 18.30: Føroyskur dansur á bryggjuni
*Allan seinnapartin og um kvøldið er ymist annað á skránni: sekkjapípu- og harmonikutónleikur, hoppiborg og annað til børnini, bjargingaroynd, sølubúðir av ymsum slag við mati og drykkjuvørum.*
Kl. 19.30: Songløta við felagssangi, solistum og tónleiki
Á 5. hædd. Fólk úr Kristnastovu skipa fyri
Kl. 22.00: Dansur á 5. hædd. BE4 spælir. Kostnaður 80 kr.
Kl. 23.30: Fýrverk og felagssangur úti á molanum
*Sungið verður úr ólavsøkuheftinum í Havn*
Kl. 24.00: Dansurin á 5. hædd heldur áfram út á náttina

**Ólavsøkudag:**
Kl. 16.00: Aftur sølubúðir, tiltøk fyri børn og tónleikur
Kl. 17.00: Gudstænasta í Vor Frelser Kirke. Bergur Jacobsen prædikar. Tórur á Brúnni við urguna. Solosangur
Kl. 20.00: Konsert, fjølbroytt við fleiri góðum bólkum: "Týr", "Petersen-Olsen-Lawaetz Trio" og truba-durarnir Sámal Ravnsfjall, Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen!!!
Hildið verður á fram móti midnáttini!

Atgongumerki 180 kr.

**Ferðasamband til Bryggjuna**
Tú kanst koma út á Bryggjuna við bussi til Knippelsbro og ganga oman eftir Strandgade. Bussarnir eru 2A, 19, 48 og 350. Ella tú kanst koyra við Metro til Kristianshavns Torv ella koma við havnarbussunum hjá Ariva og DSB, sum leggja at ymsar staðir og eisini á Bryggjuni. Bæði kvøldini siglir ein havnar bussur hjá Ariva Nýhavn - Bryggjan

**Matstøðini NOMA og RAVN á Bryggjuni**
Húsið liggur á einum mola, Den Grønlandske Handels Plads

Matstovan Noma í stovuhæddini er fínt matstað. Borðreiðing er eisini uttandura í summar. Har eru prísirnir miðal matstovuprísir.

Við molan liggur eisini eitt skip, sum er innrættað til matstovu. Skipið kallast Ravn. Har fæst eisini mangur góður biti. Ein føroyingur eigur triðing av tí.

Hesi trý matstøðini vera mitt í okkara ólavsøkutiltøkum og fólk eru sjálvandi væl komin hjá teimum.